# Umbýti av starvsfólki í landsfyrisitingini

Norðurlendska tænastumannaumbýtisskipanin ger tað møguligt hjá starvsfólki í landsfyrisitingini at fara til eitt av norðurlondunum at arbeiða í eina tíð. Stuðul verður veittur til at gjalda ferða- og uppihaldsútreiðslur hjá luttakara.

Henda skipan hevur verið í gildi síðan 1979 og endamálið við skipanini er at fremja norðurlendskt samstarv. Endamálið er somuleiðis at geva luttakarunum kunnleika til fyrisiting og lóggávu o.a. í hinum norðurlondunum.

Tað er ikki neyðugt at luttakari býtir um pláss við ein starvsfelaga í einum øðrum norðurlandi, tó er onki, sum forðar fyri hesum.

Føroyar hava fyri ár 2001 fingið tillutað kr. 61.000,-. at nýta til hesa skipan.

### Skipanin virkar soleiðis

Skipanin fevnir um bæði tænastu- og starvsmenn. Uppihaldið kann vara millum 1 og 12 mánaðir í einum kalendaraári.

Stuðulin er í ár 2001 kr. 7.000,- um mánaðin umframt ferðaútreiðslur aftur og fram. Endurgjald verður bert latið fyri ferðing á bíligasta hátt. Um uppihaldið er longri enn 6 mánaðir kunnu ferðaútreiðslurnar hjá familju somuleiðis verða goldnar, um hon flytir við, eins og goldið verður fyri flutning av neyðugum innbúgvi.

Treyt fyri at fáa stuðul er, at viðkomandi fær frí við løn úr starvi sínum. Um viðkomandi fær reiðiviðbót, verður hon varðveitt, um viðkomandi átekur sær meirarbeiðsskyldu í starvinum í hinum landinum. Tíðin verður tald við í lønar- og eftirlønaraldri.

Tey, sum vilja nýta skipanina, mugu sjálvi gera avtalu við stovn í øðrum norðurlandi.

Áðrenn 3 mánaðir eru farnir eftir heimkomu, skal luttakari senda Løgmansskrivstovuni eina frágreiðing um uppihaldið, heruppií ein stuttan samandrátt á skandinaviskum máli t.d á donskum, sum Løgmansskrivstovan sendir avgreiðsluskrivstovuni hjá Norðurlandaráðharraráðnum.

### Umsóknir

Umsóknir um stuðul skulu sendast til Løgmansskrivstovuna ígjøgnum stýrið/leiðsluna á stovninum. Umsóknin skal innihalda fylgjandi upplýsingar:

1. Navn á umsøkjara, føðingardagur og bústaður
2. Starvsheiti, starvsaldur og starvsstaður
3. Arbeiðsuppgávur
4. Navn og bústaður á tí stovni, avtala er gjørd við og tíðarskeið
5. Upphæddin, sum søkt verður um - tíðarskeið og ferðaútreiðslur

Tað skal upplýsast, um umsøkjari hevur søkt um at fáa annan stuðul.

Umsóknin skal innihalda eitt ummæli frá stovninum, har stovnurin sigur frá, um viðkomandi kann fáa tænastufrí við løn.

**Umsóknarfreistin er 1. januar 2001**. Umsóknir, sum koma inn aftaná hesa dagfesting, verða bert viðgjørdar, um peningur er tøkur.

Nærri upplýsingar um skipanina fáast við at venda sær til Løgmansskrivstovuna — nýskipanardeildina og fáast eisini við at fara á heimasíðuna hjá Nordisk Ministerråd, http: // <u>www.norden.org</u> og hyggja undir <u>*Stødordningar*</u> og síðan <u>*Øvriga*</u>., sigur Løgmansskrivstovan í tíðindaskrivi.



# Maersk Air heldur fram millum Vágar og Billund

*Ætlanin hjá Maersk Air at leggja rutuna millum Billund og Vágar niður í vetur, er slept. Flogið verður framvegis tvær ferðir um vikuna á hesi rutuni*

Rutan hjá Maersk Air millum Billund og Vágar fer at halda fram óbroytt.
Í samrøðu, Sosialurin fyri stuttum hevði við fólk hjá Flogfelag Føroya, varð sagt frá, at flogrutan hjá Maersk Air millum Billund og Vágar fór at verða niðurløgd í vetur.

Men so verður kortini ikki, sigur Maersk Air í tíðindaskrivi, sum sent varð út mikudagin. Sagt verður í tíðindaskrivinum, at eftir áheitan frá fleiri kundum hevur rutuleiðslan hjá Maersk Air gjørt av, at rutan millum Billund og Vágar ikki verður niðurløgd kortini, sum talan annars hevur verið um. Flogið verður tvær ferðir um vikuna á hesi rutuni.

Eftir nýggju ferðaætlanini verður flogið til Billund mánadag og hósdag, sigur rutuleiðslan hjá Maersk Air í tíðindaskrivinum.

Annars er Maersk Air farið undir miðvísa víðkan av uttanlands rutunetinum millum Danmark og útheimin. Ikki færri enn fýra nýggjar rutur fara at byrja í døgunum 20. til 22 november í ár. Tær ruturnar verða til Cairo, Istanbul, Milano og Zürich, sigur Maersk Air.

**ej**


Blomsturlág er flutt úr Hornabø!

Nú eru vit aftur í Bøgøtu 14 har Blomsturbrá var áður (við síðuna av Einar Mikkelsen).
1. okt. eru 35 ár síðan Bigga byrjaði í Blomsturbrá. Í tí sambandi verður latið 35% í avsláttri hetta vikuskifti og alla næsta viku. Nógv vakurt til komfirmatiónina.



÷35% í BLOMSTURLÁG

BLOMSTURLÁG
Tel. 311914 • Fax 321914

Sosialurin - 311820





Langur leygardagur í miðbýnum
30. sept.
Opið er til kl. 17.00



Handlarnir í miðbýnum

NOA NOA®
NÓGV NÝTT HEIMKOMIÐ FRÁ
TONE BARKER
TRANSIT PAR-SUCH
NOA NOA
BROR & SØSTER
LANGA LEYGARDAGSTILBOÐ
NÝTT BROR & SØSTER
÷20%
BERT LEYGARDAGIN
Buksur, blusur, toppar, beltir, niðurdeilir, troyggjur
29 Í Tróndargøtu
Tel. 31 82 00
Sosialurin - 311820

Vetrarklæðini eru komin
Kavaklæðir, jakkar, regnklæðir, gummistivlar,blusur, buksur, troyggjur o.m.a.
Eisini hava vit hópin av útgerð til pinkubarnið



LEGO WEAR Approved by Children
BARNAÚTGERÐ
N. Finsensgøta 18 • 100 Tórshavn • Tel. 315101
Sosialurin - 311820

Hugna tær við jólabroderíum




Bygdarordrar verða eisini avgreiddir

Tógvhandilin IGLOO
Sverrisgøta 19
Postboks 181
110 Tórshavn
Tel. 315264
Fax 319623
Sosialurin - 311820